













# Jákup gleðir seg

**Hóast hann hevur leikt millum annað á Hampden Park og hevur verið danskur meistari, so heldur Jákup Mikkelsen framvegis, at tað er nakað serligt, tá norðoyastevnudystur við KÍ stendur á skránni**

NORÐOYASTEVNUDYSTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir tíggju ár sum yrkisleikari uttanlands, gjørdi Jákup Mikkelsen í fjør av, at leiðin nú gekk aftur til Føroyar. Hóast talan eitt skifti tóktist vera um, at onnur feløg eisini vóru í myndini, so gjørdist tað ikki óvæntað heimstaðarfelagið, KÍ, sum fekk ágóðan av hesum, og síðani januar mánað hevur Jákup so virkað sum hjálparvenjari hjá Ove Flindt Bjerg, sum í 100 ára føðingardagsárinum hevur fingið uppgávuna at taka sær av KÍ-liðnum.



*Eg haldi framvegis, at tað er stuttligt at spæla á heimavøllinum her í Klaksvík, og tá talan so eisini er um stevnudyst, so gerst tað bara enn meira hugaligt, sigur Jákup Mikkelsen*

*Myndir: Álvur Haraldsen*

## Hildu Skála var keðiligt

Her er talan sjálvandi um nógvar uppgávur av ymsum slag, og ein av teimum føstu er so norðoyastevnudysturin, sum í ár stendur móti Skála.

Og tá vit høvdu orðið á KÍ-málverjan, var hann ikki í iva um, hetta er ein dystur, sum hann við stórum spenningi sær fram til.

– Eg gleði meg til dystin, og eg vóni, at tað verður ein góður dystur. Tá skráin varð løgd, høvdu vit hug at ilskast, tí vit vildu heldur hava eitt av stóru liðunum á vitjan á norðoyastevnu, men nú er Skála heilt frammi í oddinum, so tað verður kanska ikki so lætt allíkavæl.

Men tú hevur roynt mangt og hvat. Millum annað at staðið sum danskur meistari, umframt at tú eisini hevur leikt á eitt nú Hampden Park í Skotlandi. Hevur tað ikki við sær, at spenningurin til ein slíkan dyst er nakað minni, enn hann plagdi at vera.

– Slettis ikki. Eg haldi framvegis, at tað er stuttligt at spæla á heimavøllinum her í Klaksvík, og tá talan so eisini er um stevnudyst, so gerst tað bara enn meira hugaligt. Verður veðrið gott, so koma ivaleyst eisini nógv fólk, og sum eg minnist norðoyastevnudystirnar, so er tað fyri tað mesta góð minni.

Minnini eru tó ikki eins góð fyri allar klaksvíkingar. Eitt nú tapti liðið í 1989 7-1 fyri HB, men Jákup er skjótur at svara, at hann ikki var við tann dystin.

– Ta ferðina var tað málmanslegendan her norðuri (Jógvan Linklett, blðm.), sum stóð í mál. Sjálvur hevði eg slitið eitt liðband í fótinum, og tá John William Joensen so fekk heilaskjálvta, vóru boð eftir Jógvani. Hann hevði als ikki vant tað árið, men stóð seg kortini væl, og tað var so ikki hansara skuld, at tann dysturin varð taptur.

## Framtíð sum venjari

Sum nevnt omanfyri, so er Jákup nú eisini hjálparvenjari í KÍ. Ein leiklutur, sum hann altso hevur havt í knappliga fimm mánaðir, og sjálvur heldur hann, at hann nú er farin at venja seg við hetta.

– Mær dámar framvegis best bara at spæla, men hinvegin so gevur hetta mær eitt nógv størri innlit í tað, sum fyriferst kring liðið. Og sjálvandi er talan so eisini um eina aðra ábyrgd á vøllinum. Men sum heild, so trívist eg sera væl í hesum leiklutinum.

Somikið væl, at venjarayrkið eisini er nakað, sum tú av álvara er farin at hugsa um.

– Ja, tað haldi eg. Tað er í øllum førum ein sera spennandi tilvera. Sum venjariført tú kanska ikki verið við í stríðnum á vøllinum, men nervarnir undan og undir uppgávuni eru í minsta lagi lika stórir, heldur hann.

Enn er tað tó ikki so, at Jákup stendur einsamallur við stýrisvølin, og tað verða kanska nøkur ár, áðrenn tað kemur hartil. Men fram til tá, so trívist hann fínt í leiklutinum sum hjálpari. Ikki minst, nú hann hevur høvi at taka við læru frá einum av fremstu venjarunum í ríkinum.

– Tað er heilt víst, at tað er ein stórur fyrimunur, at eg kann samstarva við Ove. Snøgt sagt, so ræður tað bara um at suga lærdómin til sín. So fáa vit at síggja, um eg eisini fái brúk fyri tí í framtíðini, sigur Jákup Mikkelsen at enda.



*Jákup Mikkelsen var í tíggju ár yrkisleikari uttanlands, og royndirnar frá hesum eru nógvar. Hann heldur tó framvegis, at stevnudystir eru nakað serligt, og hann gleðir seg, nú hann fyri fyrstu ferð síðani 1994 skal spæla norðoyastevnudyst*